Petur Eli Mikkelsen farin

Dáttlig vóru boðini hósmorgunin 19. apríl. Petur Eli er deyður í nátt á Landssjúkrahúsinum, kvøldið fyri var hann við sjúkrabili fluttur á sjúkrahúsið, dótturin Elin var við honum, og tað skuldi so verða síðsta ferð hansara.

Petur Eli var føddur í Syðrugøtu 10. september 1934 sonur Perlinu, f. Højgaard úr Rituvik og Poul Amaliel úr Syðrugøtu.

Ninnema og Petur Eli eiga børnini Elin og Jóannes, tey búgva í Syðrugøtu og Barbaru og Petur Páll, sum búgva í Havn.

Á ungum árum fór Petur Eli Mikkelsen til skips; fer á læraraskúla og tekur læraraprógv í 1960. Frammanundan hevði hann verið á Føroya Fólkaháskúla ein vetur og síðan á Grundtsvigs Højskole, Hillerød. Lærari var hann á Toftum 1960-67, síðani fyrstilærari við Gøtu skúla og starvaðist har, til hann gavst í lærarastarvinum í 1997.

Á so mangan hátt var Petur Eli sera virkin, eldhugaður fór hann undir uppgávur sínar, dugdi væl at læra frá sær, frásøgumaður millum teir fremstu, søgu- og kvæðafróður sum hann var. Í orðaleiki vann hann sær ofta áhugaðan áhoyraraskarða, livandi og lætt bar hann fram sínar hugleiðingar, framsøgmaður og upplesari var hann góður.

Seinast, eg hevði ta eydnu at lýða á hann, var á summarstevnuni hjá Javnaðarflokkinum á Svangaskarði á sumri 2001; har hugleiddi hann um barnaárini hjá bygdadreingi, tíðina mangur av hansara ættarliði minnist afturá við sorgblídni, so meistarliga hann dugdi at orðfesta seg.

Petur Eli sat sum varamaður á tingi eitt skifti fyri Øregaard í 1966.

Álitismaður var hann á fleiri økjum. Deknur í gomlu Gøtu kirkju í 5 ár frá 1967, í kirkjuráðnum 1968-72, landsskúlaráðnum 1980-84, mong ár nevndarlimur í Eysturoyar Javnaðarfelag, sum formaður og sum kassameistari. Úrmælingur var hann sum telvari; miðskeiðis í sjeytiárunum umboðaði hann Føroyar á fleiri talvstevnum í útheiminum, nevndarlimur í Talvsambandi Føroya.

Evnini hevði Petur Eli at kveikja og at birta gróðurbaran hugburð. Tøgnin valdaði ikki, har hann var partur av samveruni. Íðin var hann, eisini at nýskapa og økja um virksemi í heimbygdini, m.a. tey árini brøðurnir fjøltáttu vinnulívið við mekaniska virkinum "Havídnaður".

Samstundis við ófrættuboðunum, at Petur Eli bráðliga er farin av foldum, liggur elsti bróður hansara, Petur Pauli Mikkelsen, skipari, Klaksvík, undir børu. Petur Pauli var skipari á línuskipinum "Kvikk" drúgvt áramál og gavst sum langfarafiskimaður miðskeiðis í 80'unum, síðan hevur hann róð út saman við soninum Andreas, og hava teir vunnið mangan dýra fongin til lands.

Hetta síðsta árið fór at bila við heilsuni – Petur Pauli andaðist 16. apríl 78 ára gamal.

Vit drýpa høvur og lýsa frið yvir minnið um frægu brøðurnar Petur Paula og Petur Eli Mikkelsen.

jl.

John Dam in memoriam

Nú kveikjandi ljósið og gróðurin fríðkar fold, fór John Dam, skipari í ævinleikan eftir burturav stranga og krevjandi sjúkralegu, og ævigi friðurin fevndi hann.

John Dam var føddur í Vestmanna 5. oktober 1931, Mathilda og Viggo í Skúlanum vóru foreldur hansara, 8 vóru tey í systkinaflokkinum.

Fáur hevur sum hann lagt fyri seg í strembanini at fáa sum mest og best burturúr sjónum. Hjá honum vóru eingi mørk sum forðaðu, helt hann tað vera royndina vert.

Skúlaskyldan var ikki reiðiliga av, tá hann fór við "Grønanesi" í 1945 við pápanum, Viggo, sum skipara.

Síðan fór hann við "Stella Argus", Kvívíks Tummas var skipari, so "Vesturskin", Dia á Vertshúsinum var skipari, "Kalsevni", Andreas í Hvannasundi skipari.

Og í 1951 fór John sjálvur sum skipari við "Fame", førdi hana til 1955, tá fer hann á stýrimansskúla og selur "Fame" til Debes Christiansen o.fl.. Hann fer nú út at sigla við J. Lauritsen reiðarínum, til hann í 1961 fer við "Baki". Hann førir "Bak" til hann í 1968 fer at byggja "Vesturvarða", í apríl 1969 ger hann royndirnar í Vesturgrønlandi, sum eru upphavið til rekjufiskiskap føroyinga.

Fyrstur var hann á hemaraveiðu, við "Baki" í 1961.

Fyrstur á rekjuveiðu í Vesturgrønlandi við "Vesturvarða".

Fyrstur á laksaveiðu í Vesturgrønlandi, eisini við Vesturvarða.

Til jóla 1974 kemur "Suðurvarði" og í 1977 rekjubáturin "Fame", sum hann rekur til 1986.

Í 1988 hevur hann bygt triðja "Fame" til skeljaveiðu, tá hevði hann frammanundan gjørt seg kunnugan við hesa veiðu umborð á norskum skeljabáti.

Mikið er sagt og skrivað um burturav avrekini, sum John Dam í fjølvirkna lívi sínum sum fiskimaður og leiðvísari; neyvan ber til at gera nakran samanburð.

John Dam var maðurin á brúnni í orðsins beinleiðis sum myndaliga týdningi. Tað kravdi almikið av manninum, sum fekk eitt hendingarík og virkið lív; hann megnaði tað, sum mangur hoknaði undir. Við ótrúligu evnum sínum í veiðuleitan, hevur hann ríkað og gjørt Føroyar kendar og virdar.

John fekk harða lagnum, nærum í 7 ár bundin at seingjarlegu, tolin hevur hann verið í truplu og likamliga sera krevjandi sjúkuviðgerðum, hann mátti tola mongu árini.

Fyrru konuna, Unn, misti hann undir svárum vanlukkuumstøðum í 1966, og sat hann tá eftir við børnum Hans Andriasi, Maritu og Zachariasi.

Í 1968 komu Oddvør og John saman. Oddvør vígdi manni sínum fullan kærleika. Hon hevur verið stuðul hansara og troystin, bæði í virkna lívi hansara sum vinnulívsmaður og sjómaður og ikki minni hesi seinnu sváru ár á sjúkalegu, hevur hon verið um hann nátt sum dag.

Vit lýsa frið yvir minnið um stórmennið John Dam, skipara – og siga okkara djúpu samkenslu við konuni og tykkum børnunum.

jl.

Ein megnarkvinna er farin
– Ingu Falkvard Danberg til minnis

Vit drýpa høvur í sorg. Okkara kæri liðfelagi og vinur, Inga Falkvard Danberg, er ikki okkara millum longur. Hon, sum altíð legði so nógv fyri og stríddist so manniliga, mátti boyggja seg fyri herviligari sjúku. Tað er ófatiligt, veruleikin er trupul at góðtaka, men sum Inga uttan iva sjálv hevði sagt: "lívið má halda fram" og so hevði hon brett upp um armar og var farin til verka. Í djúpu sorg okkara eru góðu og bjørtu minnini ein uggi og geva styrki at halda fram, har Inga slepti.

Inga var heil, har hon var, kundi á vøllinum tykjast avgjørd og sjálvráðin, men aftanfyri fjaldi seg ein ivandi og hjartagóð persónmenska. Hon vildi ongantíð gera nøkrum órætt, og hon royndi altíð at skilja tingini frá fleiri síðum. Hon var Neistakvinna av heilum hjarta, og hennara partur lá ikki eftir, heldur ikki um brúk var fyri henni uttan fyri vøllin. Í venjingini gav hon seg altíð fult og heilt og var fyrimyndin fyri mangan av viðspælarum sínum. Venjarar og tey, sum vóru uttan um liðið, vistu, at tey í Ingu høvdu ein vinnara. Bæði til venjing og til dyst ofraði hon tað, sum skuldi til og meira afturat fyri at vinna. Inga hevði vilja og yvirskot sum fáur; var formurin eftir hennara egna tykki ikki nóg góður, so rann hon nakrar ferðir oftari enn hinar, tí hon mátti orka og hon orkaði. Hon kravdi nógv, bæði av sær sjálvari og viðspælarum sínum, men hon gav eisini nógv. Hon var skemtilig og hittinorðað og var ikki bangin fyri at fara um mark. Kundi møta upp til avgerandi dyst við appilsingulum hári ella onkrum uppaftur øðrvísi. Hon tordi, og hon oysti av sínum yvirskoti, tí var altíð avbjóðandi, skemtiligt og hugnaligt at vera saman við henni. Hon var ein góður vinur, tú kundi leggja títt hjarta víðopið fyri hana, og hon gav sær stundir at lurta eftir tær; var samstundis følin, kendi á sær, um okkurt ikki var sum tað skuldi hjá liðfeløgum sínum, og sum liðskipari ofraði hon nógva tíð og nógv av sær sjálvari fyri at fáa liðfelagsskapin at virka.

Í sínum arbeiði var hon eisini altíð hjálpsom og fyrikomandi. Komst tú á gátt í ítróttarhandlinum, har hon starvaðist, so var hon altíð til reiðar at finna tað fram, sum júst tær vantaði. Hon hevði altíð tíð og yvirskot til eitt hugnaligt prát, og sjálvt eftir at sjúkan hevði gjørt vart við seg, var tað tann sama glaða og fryntliga Inga, sum tú møtti í handlinum, sum sjálvt tá hevði yvirskot til at tosa við fólk um teirra trupulleikar, og eisini hevði yvirskot at ugga fólk, sum høvdu hug at eymka hana. "Nei, hon skuldi bara fáa svar upp á kanningarnar og armin at virka aftur, sum hann hevði gjørt áður, so var hon klár at spæla fult og heilt á 1. deild aftur". Liðið hevði brúk fyri at vinna, og tí vildi hon hjálpa til við. "Eg havi ov nógva orku í mær at sita á beinkinum í fyrstu deild, so heldur spæla heilan dyst við 2. deild", sum hon sjálv hevði á orði, einans tveir mánaðir áðrenn hon andaðist. At tað kanska meiri var vilji enn orka, her var talan um, er ein onnur søga, men tað er ein góð mynd fyri, hvussu nógv Inga altíð legði fyri, og at hennara partur ongantíð lá eftir, tá tøk skuldu takast og dystir skuldu vinnast.

Vit vildu øll, at hon eisini hevði vunnið sín seinasta dyst, tó at so skuldi ikki verða, men í Neistanum hevur hon gróðursett viljan og áræðið, sum fer at bera ávøkst millum teir leikarar, sum spældu saman við Ingu og millum teir yngru leikararnar, sum sóu hana sum sína fyrimynd.

Orð eru fátæk slíkar løtur í lívinum, men sjálvt í sorgini geva minnini styrki, og Inga var ein sum við síni gleði og sínum lívsvilja skapti vón og trúgv uppá, at alt helst fór at laga seg tá til stykkis kom. Vit hava øll mist, men svárast eru sorgin og saknurin hjá tykkum sum stóðu henni næst. Gævi tit finna styrki í minnunum um tykkara kæru konu, mammu, dóttur, systur, ommudóttur, verdóttur, svigarinnu og fastur.

Ærað veri minnið um Ingu.

Vár

RSROKNSKAPUR
hj Arbei sloysisskipanini fyri 2001

(1.000 kr.)

RAKSTRARROKNSKAPUR

	2001	2000
Inngjøld	137.126	150.160
Útgjøld v.m.	-60.160	-80.066
Tekniskt úrslit	**76.966**	**70.094**
Útrei›slur til starvsfólk og fyrisiting	-10.497	-11.924
Úrslit á›renn avskrivingar	**66.469**	**58.170**
Avskrivingar	-898	-699
Úrslit á›renn fíggjarpostar	**65.571**	**57.471**
Fíggjarpostar, netto	16.662	12.858
Úrslit av vanligum rakstri	**82.233**	**70.329**
Serligar inntøkur	8	224
Rakstrarúrslit	**82.241**	**70.553**

FÍGGJARSTØ‹A pr. 31. desember

Aktiv

	2001	2000
Stø›isfæ íalt	**1.393**	**1.713**
Tí›aravmarkingar og forútgoldi›	441	388
Skuldarar	2.181	1.537
Lánsbrøv	283.511	141.377
Tøkur peningur	95.455	152.728
Umfer›arfæ íalt	**381.588**	**296.030**
Aktiv íalt	**382.981**	**297.743**

Passiv

	2001	2000
Stovnsfæ	93.840	93.840
At flyta til næsta ár	280.983	168.742
Eginogn íalt	**374.823**	**262.582**
Avsetingar íalt	**0**	**30.000**
Skyldugur arbei›sloysisstu›ul	3.876	4.340
Ognarar	1.182	756
Onnur skuld	3.100	0
Tí›aravmarkingar	0	65
Skuld íalt	**8.158**	**5.161**
Passiv íalt	**382.981**	**297.743**

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stu›ul til arbei›sleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbei›sleysum at fáa arbei›i og at umsita arbei›sávísing fyri føroyska arbei›smarkna›in. Á ALS starvast í løtuni 19 fólk. Virksemi› hjá ALS er í høvu›sheitum lógarásett. Ovastu lei›sluna hevur st‡ri› fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbei›sgevara- og løntakarafeløgunum á arbei›smarkna›inum - ver›ur valt av Føroya Landsst‡ri.

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
teldupostur: als@als.fo

Hoyggjturkari



• Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
• Bíligur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman írokna streym og dieselolju
• Tú kanst turka gras í oysandi regni fyri umleið kr. 20,- um tíman
• Kvalitetur og long livitíð
• Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.05.02

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla & umbo - Tel. 315600 - Fax 318008

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

Sosialurin
www.sosialurin.fo